

# Moby the Pink Pilot er Føroya besti nýggi bólkur

Argjabólkurin Moby The Pink Pilot vann tónleikakappinigina Fm08 leygarkvøldið í Reinsarínum í Tórsgøtu í Havn. Nummar tvey gjørdist Eysturoyarbólkurin Collapse og á triðja plássi kom bólkurin 3st. Vinningurin til Moby The Pink Pilot er 5 dagar í studio Oyravox við teknikara, umframt møguleikan at spæla á Summarfestivalinum, G! festivalinum og á Føroya Festivalinum 2009. Tað eru teir tríggir Fróði Hansen, sang og trummur, Niels Jákup í Jógvanstovu, bass, og Bartal Augustinussen á gittara, sum manna Moby The Pink Pilot

# lum ung



*Heroin, kokain og ecstasy eru eftir øllum at døma alt meira vanlig millum ung í dag*

vanligt, meðan sproyturnar enn bara hoyra festivalunum til.

- Men á festivalunum er tað eisini nógv til av tí. Á G!-festivalinum mátti løgreglan finkanna alt teltøkið fyri sproytur, áðrenn fólkini sluppu inn at rudda eftir festivalgestunum, og tað var ikki einki, teir funnu, leggur Beinta Joensen dent á.

## Fyribyrgja ikki nóg væl

Tann myndin, Beinta Joensen fekk av støðuni undir átakinum, er ræðandi.

- Hetta er ræðandi, tí tað eru børn í 8.-, 9.- og 10. flokki. Tey eru børn í aldrinum 13 til 17 ár, og tey eru øgiliga tilvitaði um øll hesi rúsevnini, vísir Beinta Joensen á.

Samstundis sum tað vísir seg at tey ungu verða alt meira von við at umgangast hørð rúsevni, hevur Fyribyrgingarráðið lagt seg eftir dellunum og á sigarettirnar.

- Tað undrar meg at tey ikki geva rúsevnunum gætur. Tað hevur eydnast væl hjá Fyribyrgingarráðnum við royking og feitti, men tað átti at verið flutt fokus, áðrenn hetta veruliga verður ein stórur trupulleiki, tí tað er ein trupulleiki, sigur Beinta Joensen, sum heldur tað vera sera spell, at Fyribyrgingarráðið er farið so langt burtur frá rúsevnunum.

## Mugu legalisera prátið

Tað einasta, ið kann gerast, er at kunna um rúsevnini. So bersøgin er Beinta Joensen.

- Fólk eru skeptisk tá tað kemur til kjak um hørð rúsevni, og halda at tað er einki at tosa um, tí at her eru eingi hørð rúsevni. Men vit eru rættiliga naiv tá vit halda tað. Debattirnar heima eru tað effektivasta. Vit mugu legalisera prátið um rúsevni, tí forboðin frukt smakkar altíð best, og soleiðs hevur tað verið síðan tíðarinnar morgun. Vit mugu kunna um hesi tingini. Tað er púra skeivt at tú ikki tosar við børnini um tað, tí information um rúsevnini kann forða teimum í at royna tað, stendur tað teimum í boði, greiðir Beinta Joensen frá.

## Einaferð kann vera nokk

Vandarnir við rúsevnunum eru rættiliga nógvir og ræðandi.

- Tað eru nógvar latentar sálarsjúkur, sum kunnu bróta út av rúsevnunum. Tær kunnu vera arvaligar, og liggja og bíða eftir einari orsøk til at bróta út, og tað kann vera sjokk av millum annað brádligum deyðsfalli. Tað brýtur kanska ongantíð út, men tað kann brádliga bróta út at onkrum so óskyldigum sum eitt lítið sindur av stoffum, har tú kanska hevur fingið for nógv av onkrum, vísir Beinta Joensen á.

- Bundinskapurin er so ræðuliga nógv størri og ógvusligari við rúsevnunum, enn við alkoholi. Ikki tí at bundinskapurin av alkoholi er nakað lítið í sær sjálvum, men tað setur kanska tingini í størri samanhang, leggur Beinta Joensen dent á.

## Fakfólk serliga útsett

Tað er eftir øllum at døma ikki bert ung, ið rúsa seg við hørðum rúsevnum. Tað vísir seg tó at tað eru ofta børn at karrierufólkum, sum enda úti í rúsevnamisnýtslu. Ofta verða tey útsett fyri umsorganarsvik og leita sær tí aðrastaðni eftir hjálp, tá trupulleikar stinga seg upp.

- Tey ungu, sum koma inn á Blákrossheimið, hava ofta eina øgiliga bakgrund. Umsorganarsvik og annað eru sera vanlig hjá teimum. Men rúsevnismisnýtslan er eisini útbreidd millum fakfólk, har stress-faktorurin er høgur. Tað er kent, at serliga læknar, ið hava lætta atgongd til rúsandi evni, brúka tey til at halda seg dubbaðan og til at arbeiða yvir evni. Í Danmark hava tey stórar trupulleikar av hesum, nevnliga »morfinistum«, sum rúsaðu læknarnir verða kallaðir, greiðir Beinta Joensen frá.

Orsøkin til at læknar ongantíð síggjast í hagtølunum er, at tað verður viðgjørt innanhýsis, tá trupulleikin er til staðar.

Beinta Joensen, sum hevur arbeitt á Blákrossheiminum, sigur tó at tað eru fleiri og fleiri fakfólk, ið noyðast til viðgerð fyri rúsevnismisnýtslu.

- Næstan øll tey undir 35 ár, sum koma inn til viðgerð, skulu viðgerast fyri misnýtslu av rúsevnum, og ofta eru tað blandingsmisbrúkarar, ið eisini eru mest vanligir í Føroyum, tí at tað er ikki nóg nógv til á marknaðinum til at tú kanst halda teg til eitt rúsevni. Samstundis eru hesir eisini teir ringastu at viðgera, sigur Beinta Joensen.



*- Tey hørðu rúsevnini eru allastaðni, og tað eru børn í aldrinum frá 13 til 17 ár, sum eru sera tilvitaði um hesi rúsevnini, sigur Beinta Joensen, fyribyrgingarráðgevi við serkøni innan rúsevnismisnýtslu.*